**Mentamálaráðið**
MENTAMÁLADEILDIN

# LANDSANTIKVARUR

**Vilt tú verða við til at styrkja og menna okkara samleika sum tjóð? Hevur tú visjónir, hug og hegni at umsita og miðla okkara mentanararv, so ert tú leiðarin, ið vit leita eftir.**

sansir.fo

Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum, ágrýtnum og engasjeraðum stjóra til Føroya Fornminnissavn.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá landsantikvarinum er at vera stjóri á Føroya Fornminnissavni, sum er stovnur undir Mentamálaráðnum og m.a. hevur til endamáls:

- at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum
- at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum,
- at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð,
- at hava eftirlit við friðaðum bygningum,
- at hava eftirlit við bygdasøvnum og veita teimum hjálp og leiðbeining.

Harumframt umsitur Fornminnissavnið ávísar friðaðar ognir landsins.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava kandidatútbúgving innan fornfrøði, fólkalívsfrøði, søgu ella samsvarandi.
Harumframt vænta vit, at tú

- hevur hug og hegni at leiða, og at tú við tínum leiðsluhátti skapar trivnað og mennir starvsfólk og stovnin sum heild.
- ert visjoner/ur, hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og taka av teimum avbjóðingum sum liggja fyri framman.
- hevur evni og vilja til at samstarva.
- ert sjónlig/ur í leiðarastarvinum, og at tú dugir væl at lýsa tíni sjónamið fyri øðrum.
- hevur skil fyri fíggjarstýring og góðar fyrisitingarligar førleikar.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur leiðslu- og granskingarroyndir.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Starvið er flokkað samsvarandi 37. lønarflokki sambært tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv. Lønin er í løtuni 40.287,57 kr. (pr. 1. oktober 2006 – 40.972,46 kr.) + 15% í eftirløn um mánaðin.

Talan kann møguliga verða um, at starvið verður áramálssett, og tá verður ávíst lønarískoyti latið.

Viðmerkjast skal, at ætlanir eru um at gera bygnaðarbroytingar á savnsøkinum. Tí má tann, ið settur verður í starvið sum landsantikvarur, kunna góðtaka broytingar í setanar- og starvsviðurskiftum sínum.

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

**Umsókn**
Umsókn við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um royndir og førleika v.m. skal sendast til:

MENTAMÁLARÁÐIÐ
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 – 110 Tórshavn
Telefon 355050 – Fax 355055
Ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. august 2006 kl. 16.00.

Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á telefon 55 50 35, fyri at fáa meira at vita um starvið.

**Føroya Fornminnissavn** er stovnur undir Mentamálaráðnum. Fornminnisavnið er skipað fyrisiting landsantikvarsins, fornfrøðideild, fólkalívsdeild og bygningsdeild. Fyrsiting og deildir v.m. eru á Kúrdalsvegi 2 í Hoyvík, meðan framsýningarhølini eru í Brekkutúni 6 í Hoyvík. Sí annars heimasíðu savnsins (www.natmus.fo).

## Heimarøktin og Serforsorgin
Heimarøktin

**Heimarøktin í økinum Vágar/Norðstreym søkir eftir starvsfólki til aktivering av eldri á Korndalsbýlinum á Eiði.**

Eitt starv sum ítrivsvegleiðari á setanarbrøki 0,5 í tíðarskeiðnum 1. september 2006 til 31. desember 2006 er leyst at søkja.

Arbeiðstíðin er dagtímar mánadag til fríggjadag.

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving sum ítrivsvegleiðari, heilsurøktari ella ergoterapeutur.
- Hevur hug og hegni at starvast við eldri fólki og at samstarva við ymiskar fakbólkar
- Kann tilrættaleggja aktivering í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkaranum

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrksifelag.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til økisleiðaran á telefon 333249 og 282249.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreym**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 21. juli 2006.**

## Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstova okkara stongd frá 17. juli 2006 t.o.v. 11. august 2006.

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22 · Boks 106
FO-110 Tórshavn
Telf. 359595 · Fax 359596
T-postur: advokat@advokat.fo

## STARVSFÓLK

Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum:

· Skrivstovufólk til 3/4 tíð
· Sølufólki

Skrivlig umsókn skal sendsast til:
*Eikin · Postsmoga 2203 · 160 Argir*

Eikin

*- eitt sindur hugnaligari*




**Útferðir í Norðoyum:**
Frá Hvannasundi og norður um Enniberg, ella runt Fugloy ella Svínoy. Eisini beinleiðis til Svínoy og Fugloy eftir avtalu.
Vit eru til taks alt døgnið.
Ring: m/b. Alpha Pilot
**telefon 22 08 49**

Sosialurin
Sosialurin i